*- Hetta er tað harðasta sum eg nakrantíð havi gjørt, sigur Livar Nysted. Nú kennir hann síni mørk, og er komin eitt stig víðari í fyrireiking síni til túrin tvørtur um Atlantshavið*



# – Eg var í stúku

**Livar tekur samanum túrin og sigur, at tá ið síðsti dagurin kom at enda vóru allir koyrdir heim á "base-camp". Har tóku læknar móti teimum, og fingu nógvir viðgerð fyri niðurkøling.**
**- Men ikki eg, flennir Livar. - Eg var í føroyskari stúku.**
**Eg reisist úr stólinum, og takki fyri meg. Livar takkar fyri vitjanina.**
**Á veg aftur til Klaksvíkar kann eg ikki lata vera við at hugsa, hvar mínar egnu grensur liggja. Eg flenni innantanna, og haldi at nú man vera best at fylgja við, hvussu leikur ferst hjá Livar.**
**Eg ætli mær so sanniliga at fylgja honum tvørtur um Atlantshavið. Men tað verður nokk úr fjálgu stovuni. Við einum heitum kaffimunni.**

- Soleiðis fór hesin dagurin. Vit vóru upp og niður gjøgnum hesar pelarnir í nakrar tímar, og rundaðu av við at rógva tríggjar tímar afturat á vatninum, greiðir Livar frá.

## Finna grensurnar

- Leygardagurin hevur nokk brent seg fastan í minnið hjá mær, leggur hann fyri.



*Gott er við einum heitum munni eftir ein langan og sera strævnan dag. Livar Nysted situr næstuttastur vinstrumegin*

Klokkan hálvgum fimm vóru teir vaktir, tí teir skuldu byrja at ganga klokkan fimm. Hann skundaði sær at pakka ryggsekkin, eitt sindur at eta og so avstað. Uttanfyri leikaði veðrið í. Vindur, regn og sera kalt. Øll hava eina grensu. Nú skuldu grensurnar finnast.

Teir gingu gjøgnum skotska "highlandið". Við eitt sindur av suppu triðja hvønn tíma skuldi bara gangast, til ein ikki kláraði meir. Ein fyri og annar eftir fullu menninir frá.

- Eg mátti sjálvur leggja kongin um ellivu tíðina um kvøldið. Aftaná at hava gingið í 18 tímar, hevði eg mist so gott sum alla húðina innanlærs, og knøini føldust sum vóru tey full av grúsi. Eg var koyrdur heim á "base-camp". Á, hvat skuldi eg slappa av nú, hugsaði eg, sigur Livar brosandi.

Men so skjótt sum hann steig fótin úr bilinum, var hann vístur til eina rógvimaskinu.

- Kundi eg ikki ganga, so skuldi eg rógva, til teir, sum enn gingu á tveimum beinum eisini máttu lúta. Hendan dagin hevði eg veruliga hug til at sleppa øllum ætlanum, og bara fara til hús!

- Hattar vóru sverar greiðir, flennir hann.

## Einki minni enn ræðuligt

- Triðja dagin sluppu vit til alla lukku eitt sindur nemmari ígjøgnum, heldur Livar fram.

Teir, sum vóru førir fyri tí, fóru niðan í fjøllini at ganga í nakrar tímar, meðan restin varð sett at rógva á maskinunum. Sjálvur fekk hann forboð frá læknanum at fara nakran veg. Men so væl gekk ikki týsdagin.

- Vit vórðu aftur settir í kajakkirnar at rógva. Tríggjar tímar í senn, og so eitt sindur av suppu. Allan dagin. Tá tað fór at skýma, fingu vit boð um at leggja at landi, fáa okkum at eta, lata okkum úr vátu klæðunum og at sleppa okkum í soviposarnar. Tað frysti fýra stig!

Hann hyggur niður í borðið. - Tað frysti fýra stig, sigur hann umaftur. - Eg veit ikki um eg blundaði í meiri enn ein tíma ta náttina!

Livar hyggur framhaldandi niður í borðið. - Vit vóru knappliga vaktir, og bidnir um at lata okkum í klæðir. Ikki í turr klæði, men tey vátu klæðini frá degnum fyri, sum nú vóru beinfryst.

- Hetta var einki minni enn ræðuligt. Vit skulvu allir sum ein, og royndu sum frægast at bresta armarnar saman, men lítið hjálpti. Komnir í kajakkirnar, skuldu vit rógva allan dagin.

Tað er ilt at ímynda sær, nú vit sita í flógvu stovuni í Hvannasundi, at nakar av fríum vilja fer gjøgnum tílíkt.

- Men tað er neyðugt, greiðir Livar frá. - Tað er neyðugt at vita, nær menninir ikki klára meir, og tað er neyðugt at vita, hvussu teir reagera júst tá. Tað nyttar ikki at finna útav tí, tá ein er 1.000 fjórðingar til havs!

Starvslýsing

Meginskrivstovan

## Fíggjarfulltrúi/controllari

Eitt starv sum fíggjarfulltrúi/controllari í Nærverkinum verður hervið lýst leyst til setan skjótast tilber.

Talan er um eitt sjálvstøðugt starv í fakligum umhvørvi, har møguleiki er fyri at vera við til at menna fíggjarøkið í Nærverkinum.

Nærverkið er skipað við Meginskrivstovu og 4 tænastudeildum. Virksemið er skipað um alt landið. Tað starvast uml. 1400 fólk í Nærverkinum. Í løtuni rekur Nærverkið virksemi fyri uml. 500 mió. kr. árliga. Nærverkið er í støðugum vøkstri og stórar uppgávur liggja fyri framman innan øll okkara virkisøkir.

Nærverkið leggur dent á at hava eina miðvísa og javna tænastu innan teir karmar, politiska skipanin ásetur. Fíggjarstýring, játtanareftirlit og áhaldandi leiðslukunning hevur í hesum sambandi ein avgerðandi leiklut.

Vit hugsa okkum ein persón, ið dámar væl at arbeiða við tølum og dugir at samantvinna fíggjarliga tilfeingið við virksemið, ið fer fram í Nærverkinum. Hevur evni at skapa og framleiða vitan, ið kann nýtast sum grundarlag undir allari støðutakan og leiðslukunning. Hevur hegni til at skapa framtíðarloysnir og at seta hesar í verk, er sjálvstøðugur, hjálpsamur og hevur góð samstarvs- og samskiftisevnir.

**Vit leggja eisini dent á, at tú:**
- Hevur viðkomandi útbúgving, helst frá hægri lærustovni
- Hevur royndir innan fíggjarstýring
- Ert kønur í telduskipanum og dátugrunnum
- Hevur kunnleika til almenna fyrisiting
- Hevur málsligt hegni og dugir væl at orða teg skrivliga
- Ert álítandi og nærlagdur.

Starvið er skipað við tilvísing til leiðsluna fyri Búskapardeildina, ið er skipað sum tvørgangandi stápur á Megiskrivstovuni.

**Løn- og setanarviðurskifti**
Løn- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanarøkið fevnir um Nærverkið og tænastustaðurin í løtuni er Meginskrivstovan.

Meiri fæst at vita við at venda sær til Mary J. í Garði, stjóra, á tlf. 360000.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:

Nærverkið
Meginskrivstovan
Argjavegur 26
Postsmoga 3037
FO-110 Tórshavn

Stílað: Mary J. í Garði, stjóri

**Umsóknarfreist: 24. november 2008**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo